# Jógvan S: Fyrsta kravið á veg ímóti Fiskimálaráðnum

**Jógvan S skal hava fiskiloyvið aftur, sigur reiðarin. Men talan verður eisini um endurgjaldskrav upp á tíggjutals milliónir, umframt onnur krøv, sigur Jógvan Lutzen, reiðari**

ENDURGJALDSKRAV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Hvussu stórt endurgjaldskravið verður, veldst um, hvussu leingi Jógvan S kemur at liggja, áðrenn hann aftur sleppur til fiskiskap. Men talan verður í øllum førum um nógvar tíggjutals milliónir, sigur reiðarin*

Jógvan S skal hava fiskiloyvið aftur.

Tað stendur í eini stevning, sum reiðarin nú um dagarnar hevur sett fram ímóti Fiskimaálráðnum.

Sostatt hevur reiðarin nú gjørt álvara av at stevna Fiskimálaráðnum, eftir at Fiskiloyvið til Jógvan S varð tikið aftur í august í ár. Reiðarin er sannførdur um tað var ólógligt at taka fiskiloyvið hjá Jógvan S aftur.

–Vit fingu tilsøgn um eitt fiskiloyvi 29. apríl í 2002 og 25. august í ár varð tilsøgnin tikin frá okkum aftur. Men tað hevði Fiskimálaráðið onga heimild til at gera og tí krevja vit, at Jógvan S. fær fiskiloyvið aftur.

## Tíggjutals milliónir

Men Jógvan Lútzen, reiðari, sigur, at hetta er bara tað fyrsta sakarmálið, sum verður reist í kjalarvørrinum á avgerðini um at taka fiskiloyvið aftur.

Fleiri sakarmál eru á veg, men tað er ikki endaliga avgjørt enn, hvussu verður við teimum og tí eru tey ikki løgd enn.

Hann sigur, at teir, sum eiga Jógvan S, fara í øllum førum at krevja endurgjaldskrav fyri at hava mist fiskiloyvið. Hvussu stórt tað kravið verður, veit hann ikki.

– Tað veldst um, hvussu leingi báturin kemur at liggja. Tað gongur í besta føri eitt heilt ár, áðrenn sakarmálið um fiskiloyvið er avgreitt. Verður dómurin í tí málinum so harafturat skotin inn fyri landsrættin, ganga nakrir mánaðir afturat.

Jógvan Lútzen sigur, at sostatt er enn ikki greitt, hvussu stórt endurgjaldskravið verður, men tað veksur sjálvsagt fyri hvønn dag, Jógvan S liggur.

– Men talan verður í øllum førum um fleiri tíggjutals milliónir, sigur hann.

Hann leggur afturat, at talan kann enntá verða um eitt endurgjaldskrav fyri alt skipið sum tað er.

– Eitt skip sum liggur, forferst rættiliga skjótt og tað er lítið gott eftir av einum skipi, sum hevur ligið í tvey ár. Og reiðskapurin fer so eisini fyri skeyti.

## Skulu ikki slaktast einsamallir

Jógvan S sigur, at enn er heldur ikki endaliga avgjørt, hvørjum endurgjaldskrav verður lagt ímóti.

– Tað var felagið Línuskip, sum reisti málið og talan kann verða um eitt endurgjaldskrav ímóti felagnum. Talan kann eisini verða um eitt krav ímóti sjálvum formanninum í felagnum Línuskipum. Hetta eru alt løgfrøðiligur spurningar, sum verða viðgjørdir í løtuni.

Men tað er í øllum førum greitt, at eitt endurgjaldskrav verður so ímóti Fiskimálaráðnum.

Jógvan Lútzen minnir eisini á, at tað eru yvir 30 skip, sum hava fingið fiskiloyvið eftir somu mannagongd, sum Jógvan S fekk sítt loyvi.

Og hann finnur seg ikki í, at hann skal fáa sersømdir tann skeiva vegin.

– Vit skulu ikki slaktast einsamallir. Skal fiskiloyvið takast frá okkum, skal tað eisini takast frá øllum hinum, tað fara vit at taka stig til, sigur Jógvan Lútzen.

Hann ivast ikki í, at so fara eisini tey skipini at leggja endurgjaldskrav ímóti landskassanum.

Fær reiðarin viðhald í øllum sínum krøvum, kann málið um Jógvan S sostatt fáa avleiðingar fyri Landskassan, sum verða so álvarsligar, at í løtuni tað ber illa til at ímynda sær tað.

# Íblásturin kemur úr føroysku náttúruni

**Jón Magnus Joensen hevur listaframsýning í smiðjuni í Lítluvík fyri aðru ferð.**

LISTAFRAMSÝNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í dag letur aftur ein listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Hesuferð er tað Jón Magnus Joensen, sum sýnir fram.

Hann er ein av teimum yngru listamálarunum, men hann hevur verið við á fleiri framsýningum. Seinast var hann eisini við á Ólavsøkuframsýningini.

Hetta verður aðru ferð at hann sýnir fram í smiðjuni.



*Jón Magnus Joensen við tveimum málningum, hann hevur við á framsýningini. Vinstrumegin hevur hann ein málning, hann nevnir Morgun og málningin høgrumegin nevnir hann Bygdarlag*

Framsýningin letur upp í dag klokkan 15 og hon er opin til klokkan 20. Annars er hon opin hvønn dag frá klokkan 15-20, hetta til 8. oktober.

Jón Magnus er 40 ára gamal argjamaður, lærari av yrki og er nú lærari í Tjørnuvík.

Og hann er maður við nógvum jørnum í eldinum. Umframt pensilin, roynir hann seg eisini við penninum og hann hevur yrkt fleiri barnasangir og hann skrivar somuleiðis løg. Hann hevur eisini skrivað barnabókina Gagnleikur og hesi seinastu árini hevur hann eisini verið urguspælari í Vesturkirkjuni.

Fyrra hálvár í ár var hann á listaháskúla í Holbæk í Danmark og har málaði hann nógv.

Við á framsýningini hevur hann 34 málningar. Talan er bæði um oljumálningar og akrýl, men hann hevur eisini nøkur verk við vatnlitum.

Myndevninini hjá listamanninum eru fyri tað mesta føroyska náttúran og flestu málningarnir eru málaðir hesa tíðina, hann dvaldist á flatlondum.






*Inntrivini í føroyska búskapin fara ikki at ávirka gerandisdagin hjá føroyingum stórvegis, lovaði Karsten Hansen, landsstýrismaður, sum legði fíggjarlógina fyri 2004 fram seinnapartin týsdagin*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Yvirskotið tódnar

**Yvirskotið av rakstrinum av føroyska samfelagnum minkar komandi ár. Enn leypa góðar 100 milliónir krónur av, um avdráttir av skuld landskassans ikki verða roknaðir uppí. Pláss verður framvegis fyri skattalætta, lovar landsstýrismaðurin, men afturfyri skal sparast – serliga í almennu landsumsitingini**

FÍGGJARLÓG 2004
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Hann dregur á luftina í føroyska búskapinum, og tað sæst aftur á uppskotinum til løgtingsins fíggjarlóg fyri 2004, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, legði fram seinnapartin týsdagin. Samlaða úrslitið er hóast alt eitt lítið yvirskot. Fíggjarlógaruppskotið vísir eitt avlop á 100,6 milliónir krónur aftan á rakstrar-, løgu og útlánsútreiðslur. Men tá árligu avdráttirnir av skuld landskassans eru goldnir, síggjast reyð tøl á botnlinjuni.

Nógv tann største parturin av landskassaskuldini er lánið til danska ríkiskassan, sum verður goldið aftur við 323 milliónum krónum árliga yvir 20 ár. Vanliga verða avdráttir ikki tiknir við, tá rakstrarúrslitið av at reka føroyska samfelagið verður útroknað, men hinvegin er tað júst hetta, sum serliga andstøðan plagar at brúka fyri mála sína mynd av endaliga úrslitinum av politikkinum hjá samgonguni.

Hvussu er og ikki. Avlopið á fíggjarlógini fyri 2004 er 100,6 milliónir krónur, og tað er nakað lakari enn avlopið av fíggjarlógini fyri 2003, sum var 139,6 milliónir krónur hægri.

## Varligar sparingar

Í fíggjarlógaruppskotinum til 2004 verður lagt upp til, at fíggjarlógin ikki skal virka tálmandi, nú niðurgongdin í altjóða búskapinum eisini hevur rakt føroyska búskapin. Tað verður gjørt við einari varisligari lækking av útreiðslunum og við at halda fram at veita skattalættar í 2004, lovar Karsten Hansen, landsstýrismaður.

Aðalmálið er enn sum áður fullveldi við sjálvberandi føroyskum búskapi. Arbeitt verður tí framhaldandi við at tillaga útreiðslur landskassans til minkandi blokkstuðul úr danska ríkiskassanum. Sparingar mugu tí fremjast í 2004, sum raka gerandisdagin hjá føroysku borgarunum minst møguligt, sigur Karsten Hansen í viðmerking til fíggjarlógina.

Sparingarnar skulu eisini síggjast í ljósinum av, at óvanliga stóri vøksturin í føroyska búskapinum seinastu árini, nú er steðgaður, og vøksturin í ár fer at liggja undir 3,6 prosent í ársins prísum. Høvuðstrupulleikarnir til niðurgongdina í búskaparvøkstrinum sigur landsstýrismaðurin stava frá trupulleikunum í alivinnuni, og at prísirnir á fiski á heimamarknaðinum eru falnir nógv og eru lágir í løtuni. Sparingar verða framdar við at gera »dagføringar og broytingar í lógarbundnu útreiðslunum, soleiðis at tær støðugt verða tillagaðar føroyskum viðurskiftum,« verður sagt. Ætlanin er eisini at umleggja skuldina hjá landskassanum til danska ríkiskassan, so rentuútreiðslurnar vera minni. Alt sparingar, sum í lítlan mun ávirka gerandisdagin hjá føroyska borgarunum, sigur Karsten Hansen.

## Bleytar raðfestingar

Í fíggjarlógini síggjast eisini aftur tær raðfestingar, sum samgongan ger. Sambært fíggjarlógini hava heilsumál, almannamál og útbúgving fingið hægstu raðfesting. Landsstýrið hevur tí gjørt eitt fíggjarlógaruppskot, har høvuðsraðfestingarnar fara til sjúkrahúsverkið, eldraøkið og útbúgving.

Á íløgusíðuni fer landið at gera løgur fyri 313 milliónir krónur. Samstundis verða bygningar hjá landinum seldir fyri 66 milliónir krónur, og tí verða íløgurnar hjá landskassanum 247 milliónir krónur netto.

Nýggja suðuroyarskipið er størsta einstaka íløgan hjá landinum nakrantíð. Skipið kostar góðar 300 milliónir krónur at byggja og verður goldið yvir trý ár. Í 2004 verður síðsta gjaldið á 109 milliónir krónur goldið. Harafturat skulu 38 milliónir krónur brúkast til nýggja samferðsluhavn í Trongisvágsfirði.

Íløgur verða eisini gjørdar fyri 32 milliónir krónur til sinnisveik, eldrabústaðir, býli til heimleys, venjingarmiðstøð, bústovnar til børn við serligum tørvi og innan serforsorg. Útbúgving og gransking fáa tilsamans 35 milliónir krónur á løguætlanini.

Blaðið fór til prentingar, áðrenn tíðindafundin seinnapartin í gjár, og tí verður meira at frætta í morgin.